# Osla hjálpir børnum við lesitrupulleikum




*Osla Sørensen í Norðdepli hevur júst lokið útbúgving sum andlitszoneterapeutur. Hon hjálpir mongum fólkum við alskyns trupulleikum*

**Sum tann fyrsta í Føroyum hevur Osla Sørensen úr Norðdepli tikið útbúgving sum andlitszoneterapeutur. Frammanundan hevur hon fótzoneterapi, men hon heldur, at hetta hjálpir upp á nógvar aðrar trupulleikar, tí við at massera andlitið, er ein so nógv nærri heilanum, sum verður stimuleraður við zoneterapi**

ZONETERAPI
*Solby A Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Norðdepil:** At koyra norður um Klaksvík. Til Norðdepils, Hvannasunds ella Viðareiðis krevur, at ein koyrir ígjøgnum teir báðar myrku, smølu og heldur ófantaligu tunlarnar á Borðoynni. Men tað skal til, um ein ætlar sær at koma til onkra av hasum bygdunum. Og tað eru tað so mong, sum gera. Men tey eru eisini mong, sum aftra seg við at koyra sjálvi. Hendan dagin má Sosialurin so í gjøgnum tunlarnar, tí hinumegin bíðar ein kvinna, sum hevur fingið eina útbúgving, sum ger, at hon við massasju í andlitið kann hjálpa børnum, sum hava trupult við at lesa. seingjarvætarum og mongum øðrum, sum hava trupulleikar av ymsum slagi. Húsið hjá Oslu stendur mitt í bygdini. Tað er gult og lætt at finna. Inni í hugnaliga køkinum angar av nýbakaðum bollum, og Osla dekkar borð. Uttanfyri er brennandi sól og hóast komið er út í september, so er tað sera heitt úti.

Á borðinum liggur ein bók um zoneterapi.

– Hetta er bókin, sum vit hava verið ígjøgnum seinastu átta mánaðirnar, greiðir Osla frá.

Hon tók hesa útbúgvingina í Danmark og er júst liðug. Hon gekk í skúla frá fríggjadag til mánadag. Og so var restin praksis í Føroyum.

– Mong ferðast ímillum, tá tey ganga í skúla í Havn ella okkurt. Eg ferðaðist í millum skúla í Danmark og praksis í Føroyum hvønn mánað, sigur Osla við einum skeivum smíli, sum hvørvur, tá hon sigur, at hon hevur goldið fyri alt sjálv.

– Men tað er tað vert, tí mær dámar hetta. Eg havi áhuga fyri tí, og nú kann eg hjálpa øðrum menniskjum, og tað kennist væl, sigur hon og fær sær ein kaffimunn.

## Hjálpir móti nógvum

Fólk í hópatali venda sær til Oslu Sørensen, andlits- og fótzoneterapeutur í Norðdepli. Hon hevur egna klinikk í kjallaranum, men hon viðgongur, at hon hevði viljað havt klinikk í Klaksvík.

Andlitszoneterapi er í stuttum tað sama sum fótzoneterapi, men Osla greiðir frá, at tað er øðrvísi kortini, tí tá ein masserar andlitið og høvdið stimulerar ein heilan betur enn um ein bert masserar føturnir. Summi, sum koma ynskja bæði føt og andlit, meðan onnur vilja bara tað eina. Um ein bert tekur tað eina, so varir viðgerðin umleið 50 minuttir. Bæði tekur umleið hálvanannan tíma.

Men tað er ikki bara massasja, tað heila snýr seg um. Hon finnur eisini trykkpunktir í kroppinum, og hon mýkir tey, so at tað kemur javnvág í aftur.

Osla hevur havt nógv fólk í viðgerð, og hon sigur, at hon bert hevur fingið positiv aftursvar.

– Summi ringja stutta tíð aftaná og siga, hvat tey merkja øðrvísi, og onnur ringja bara fyri at siga, hvussu væl tey kenna seg, sigur hon.

– Serliga nógv børn havi eg eisini havt til viðgerð, sigur hon.

Foreldur hava vent sær til hana við børnum, sum hava havt trupulleikar við at lesa ella at halda seg turr um náttina. Og eftir nakrar viðgerðir frá henni, er glið komið á hjá teimum.

– Tey eru farin at lesa ella hava lagt av at pissa í song, sigur Osla púra órørd, sum um tað als ikki hevur tikið hana av bóli.

Av øðrum trupulleikum, sum viðgerðin hjá Oslu kann lekja, eru høvuðpína, forstoppilsi, menustratiónspínu og so framvegis.

Osla sigur, at tað eru mong, sum eisini bara gera tað fyri vælveruna.

– Fólk eru so stressað í dag, at teimum tørvar hesa løtuna fyri seg sjálvan, har ein koplar úr og bara slappar av, sigur hon.

Herfyri hevði Osla eitt høli í Klaksvík, har fólk komu til viðgerðar, men tað hevur hon ikki longur. Og hon heldur, at mong setast aftur, tí tey noyðast at koyra ígjøgnum tunlarnar.

– Tað er ein langur teinur at skula koyra til viðgerð, so eg hevði ynskt, at eg kundi fingið eitt høli aftur í Klaksvík, sigur hon.

## Ikki falskar vónir

Tá prátið hevur gingið eina løtu, er tíð at fara niður í klinikkina. Osla hevur eina viðgerð nú, og hetta er ein, sum fær bæði andlits- og fótzoneterapi.

Tað sást væl, at hon tekur sær væl av sínum viðskiftafólkum. Persónurin hendan dagin fær eitt heitt umslag um føturnir, meðan hon masserar andlitið.

Friðarligur tónleikur streymar úr einum fløguspælara, meðan Osla arbeiðir. Tann, sum liggur á briksini og sær út til at hava tað gott.

Av og á spyr Osla, um viðkomandi hevur trupulleikar við einum og hvørjum. Og tað sigur hon, at hon merkir á andlitinum hjá viðkomandi.

– Hendan stríðist við migrenu og tunntarmurin letur heldur ikki til at vera í lagi, sigur hon. Júst hvat feilar, kann hon ikki siga, men hon masserar dúgliga tey ávísu støðini.

– Eftir nakrar viðgerðir fer viðkomandi at merkja eina broyting, men tað er umráðandi ikki at geva nøkrum falskar vónir, sigur hon og leggur afturat, at um tað ikki lekir eina sjúku ella fær pínu at hvørva, so kann zoneterapi í øllum førum gera tað meira liviligari.

Við eitt flytur Osla seg til føturnir og gevur eina massasju. Hon sigur, at tað er ójavnt frá fólki, um tað er báðir føturnir ella bara tann eini, har ein kann merkja trupulleikarnar.

Eftir ein góðan tíma er viðgerðin av, og persónurin liggur og hvílir seg eina løtu, meðan Osla riggar av. Inni í klinikkini er sera heitt, og ein kann bert ímynda sær, hvussu heitt tað er at liggja á briksuni við varmapútu og einum teppi oman yvir seg. Persónurin á briksini letur væl at viðgerðini og sigur, at hon var líka við at sovna fleiri ferðir.

– Hetta fari eg at gera aftur, sigur hon við Oslu.

Tað er tað seinasta vit hoyra, áðrenn vit fara út aftur í sólina, sum enn stendur høgt á luftini.



# Nes kommuna mennir barnaansingina

**Kjallarin í missiónshúsinum, Thabor á Toftum, verður í næstum karmur um frítíðarskúlan hjá kommununi. - Samstundis, sum vit hava tikið hetta stigið, arbeiðir Nes kommuna við eini varandi loysn á barnaansingarøkinum, sigur Súni í Hjøllum, varaborgarstjóri**



BARNAANSING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

**Toftir:** Er nógv virksemi í eini kommunu, krevst eisini ein góð og nøktandi barnaansing. Neyðugt er, at barnaansingin er væl skipað og nøktar tann tørv, ið er. Men hetta er í nógvum kommunum lættari sagt enn gjørt.

Í Nes kommunu er nógv virksemi, og tí er eisini neyðugt við eini góðari barnaansing.

## Børn á bíðilista

Súni í Hjøllum, varaborgarstjóri, sigur, at kommunan higartil hevur gjørt nýtslu av hesum loysnum í barnaansingini:

- Vit hava uppnormerað dagrøktina til 65 børn; hon er í løtuni 51, sett frítíðarskúla á stovn til 35 børn, skipað útibarnagarð til 25 børn; har eru í løtuni 23.

Hann vísir á, at kommunan hevur keypt gamla B68-húsið til barnaansing.

- Men hóast øll hesi stig eru tikin, er tørvurin kortini ikki nøktaður.

Súni sigur, at bíðilistin at fáa børnini ansaði er stórur.

- Vit hava eisini hølistrupulleikar og ov fáar dagrøktarar.

Varaborgarstjórin sigur, at Nes kommuna í seinastuni hevur viðgjørt málið um barnaansing, og fleiri møguleikar hava verið frammi um, hvussu núverandi trupulleikar kunnu loysast beinanvegin.

- Samstundis, sum neyðugt er at finna eina bráðfeingisloysn, hava vit eisini hugt at eini heildarloysn fyri framtíðina, sigur hann.

*- Neyðugt er við eini fyribilsloysn á barnaansingini beinanvegin, men ein endalig loysn á økinum skal helst ikki liggja ov langt frammi, sigur varaborgarstjórin í Nes kommunu, Súni í Hjøllum*

## Kjallarin í Thabor

Á almennum fundi mánakvøldið samtykti bygdaráðið í Nes kommunu so at gera ein sáttmála við missiónshúsið, Thabor, um leigu av kjallaranum til frítíðarskúlan, sum hevur 35 børn. Bygdaráðið samtykti eisini at uppnormerað útibarnagarðin við 23 børnum, soleiðis at rúm verður fyri fleiri børnum í dagrøktini.

- Vit miðja eftir, at hesi stig verða sett í verk í seinasta lagi fyri heystfrítíðina.

Súni í Hjøllum sigur, at hetta er ein fyribilsloysn, tí bygdaráðið er longu farið í holt við at kanna, hvussu ein varandi loysn við barnaansingini í kommununi kann koma at síggja út.

- Vónandi hava vit eina endaliga loysn um ikki alt ov langa tíð, sigur varaborgarstjórin.

# Sam avloysir Rituna um Nólsoyarfjørð

**Komandi 14 dagarnar verður Ritan á beding á Vágs Skipasmiðju**

SAMFERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Strandfaraskipið, Ritan, fer á beding í Vági komandi mánadag.

- Vit hava fingið fýra tilboð uppá arbeiði, sum skal gerast umborð á Rituni og hava tikið av tilboðnum úr Vági.

Regin Vágadal, rakstrarleiðari á SL, sigur, at Vágs Skipasmiðja hevur váttað, at arbeiði í mesta lagi tekur 14 dagar.

## Sam avloysir

Meðan Ritan er á beding ella í "dokk" í Vági, sum tað eitur, røkir Sam siglingina um Nólsoyarfjørð.

Sostatt noyðast nólsoyingar og onnur, sum ferðast um fjørðin, at sigla við Sam frá mánamorgni komandi og 14 dagar fram, nú Ritan ikki er tøk.



*Í Vági, har Nólsoyar Páll á sinni bygdi Royndina Fríðu, fer Ritan nú á beding. Komandi 14 dagarnar fer Sam at røkja siglingina um Nólsoyarfjørð fyri Rituna*

# Prísurin á ídnaðarfiski er lækkaður 15% í ár

**Hesa vikuna hava tvey føroysk og trý íslendsk skip landað svartkjaft til Havsbrún í Fuglafirði**

ÍDNAÐARFISKUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tvey føroysk skip, Christian í Grótinum og Norðborg, hava lagt svartkjaft, veiddur í føroyskum sjógvi, upp til Havsbrún í vikuni. Christian í Grótinum hevði 1150 tons og Norðborg góð 1000 tons.

Tá ið vit frættu í gjár, lá Norðborg og landaði, og Christian í Grótinum var júst farin útaftur.

## Trý íslendsk skip

Men tað eru eisini aðrir bátar enn føroyskir, sum hava landað til Havsbrún hesa vikuna.

Tríggir íslendskir bátar høvdu ávikavist 1400 tons, 600 og 300 tons; teir vóru Hakon, Bergur og Svanur, sum var hin seinasti í røðini.

Poul H. Sólstein á Havsbrún sigur, at veðrið royndist illa á leiðini vestanfyri miðskeiðis í hesi vikuni, og tá ið fiskiskapurin eisini var vánaligur, avgjørdu skipini at gevast.

Íslendsku skipini royndu eisini eftir svartkjafti í føroyskum sjógvi.

Spurdur, hví íslendsku skipini landa í Føroyum og ikki í Íslandi, sigur Poul:

- Í fyrsta lagi var veðrið keðiligt, og tey høvdu styttri sigling higar til lands. Haraftrat kemur, at prísirnir á ídnaðarfiski í løtuni eru eini 10-12 oyru hægri í Føroyum enn í Íslandi, sigur hann.

## Lægri ídnaðarprísir

Poul H. Sólstein veit annars at siga, at munandi prísfall hevur verið á ídnaðarfiski í ár.

- Sum heild, hava prísirnir verið eini 15% lægri enn í fjør.

Hann sigur, at prísfall hevur verið á so gott sum øllum úrdráttum úr fiski í ár.

- Prísfallið á ídnaðarfiski hevur so nógvar orsøkir, men sum heild kunnu vit siga, at marknaðurin í ár hevur verið meira stirvin enn annars. Nýtslan er minni, og tískil verður eisini minni keypt. Minni eftirspurningur, gevur vanliga lægri prísir, sigur Poul H. Sólstein at enda.



*Ídnaðarskipini hava fingið 15% minni fyri veiðina í ár enn í fjør. Kortini eru prísirnir á ídnaðarfiski í Føroyum í løtuni eini 10-12 oyru hægri enn í Íslandi*

ØLVINIR
komið og roynið hvussu væl 60 øl smakka !

Fyri at menna og kveikja hin Føroyska áhugan fyri øl slóðar Restorffs Bryggjarí aftur nýggjar gøtur. Bryggjaríið fær vitjan av kenda danska bryggjumeistaranum **Leif Typkær** frá **Det Danske Brygmesterkorps**. Leif Typkær fer at halda tvey ølseminar har hann fer at greiða frá øllum sum er vert at vita um øl og høvið verður at smakka uppá 60 danskar øl í Tiltøkini sum hvørt vara umleið 3 tímar verða :

Í Vertshúskjallaranum
Fríggjakvøldið 12. Sept og
Leygarkvøldið 13. Sept Kl 20.30.

Kostnaður er bert kr. 100,-

Tað er einans pláss til 45 luttakarum hvørt kvøldið so tað er at melda seg til beinanvegin á :

T-post: restorff@post.olivant.fo
Fax 31 97 28 ella við at ringja á tlf 31 47 28
og tilskila hvat av kvøldunum ein ynskir at luttaka.

YERTSHÙSIÐ
hjá Restorff
tel 21 35 10